## UEFA hevur valt Ársins lið

UEFA hevur mannað eitt lið við teimum bestu fótbóltsspælarunum, sum spældu í Europa í fjør. 60 spælarar vóru í uppskoti til liðið, sum kom at síggja soleiðis út:

Gianluigi Buffon (Juventus/Italia) - Gianluca Zambrotta (Barcelona/Italia), Fabio Cannavaro (Real Madrid/Italia), Carles Puyol (Barcelona/Spania), Philipp Lahm (Bayern München/ Týskland) -

Steven Gerrard (Liverpool/England), Cesc Fabregas (Arsenal/ Spania), Kaká (Milan/Brasilia),

Ronaldinho (Barcelona/Brasilia) - Thierry Henry (Arsenal/ Frakland), Samuel Eto'o (Barcelona/Kameroun).

## Atli Danielsen spældi við Frem



Atli Danielsen hevur seinastu tíðina royndarvant í danska 1. deildarfelagnum Frem. Atli vandi við liðnum áðrenn jól, og hann hevur verið aftur í felagnum eftir nýggjár.

Leygardagin spældi Frem venjingardyst ímóti Avarta, og her slapp Atli veruliga at royna seg. Atli spældi við allan dystin, og hann slapp at royna seg bæði á miðvøllinum og í miðverjuni. Atli fekk einasta gula kortið í dystinum.

Frem vann dystin 3-0, og heimasíðan hjá Frem skrivar, at Frem var tað betra liðið allatíðina.

Neistin-StÍF 24-25 (10-14)

# StÍF stevnir móti finaluni

**Fyri triðju ferð í ár vann StÍF við einum máli ímóti Neistanum í Atlantic Airways deildini. Sigurin kundi tó verið enn størri, men móti endanum var Neistin líka við at fáa javnleikin**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*StÍF førdi at kalla allan dystin, men móti endanum var líka við, at Neistin fekk bjarga sær javnleikin. Teir gjørdust tó júst ov stuttir*

Gongdin hjá strandingum hevur verið heilt á leið í ár. Undan dystinum ímóti Neistanum lógu teir á øðrum plássið í Atlantic Airways deildini hjá monnum, og við sigri í dystinum kundu teir næstan fáa Neistanum úr stríðnum um finaluplássið.

Hjá Neistanum hevur ikki gingið so væl síðstu dystirnar. Teir fingu eina flúgvandi byrjan uppá grundspælið, men so steðgaði upp. Undan heimadystinum ímóti strandingum høvdu teir ikki vunnið í 5 dystir, og tí var týdningarmikið hjá teimum bláu at fáa gongd á aftur spælið. Ein sigur var eisini mest sum eitt krav, tí taptu teir dystin, so vóru heili 6 stig upp til StÍF á 2. plássi.

### Sera góð strandaverja

Liðini byrjaðu við eini sera høgari leikferð fyrstu løtuna, og líkt var til, at hetta kundi gerast ein sera málríkur dystur. Eftir góðar 5 minuttir høvdu liðini skotið 8 mál. Hesa løtuna hevði serliga Neistin nøkur sera góð álop, har teir spældu seg ígjøgnum StÍF-verjuna við nøkrum finum álopsopningum.

Spakuliga byrjaðu verjurnar tó at spæla seg heitar, og nú vóru tað knappliga tær, sum settu dagsskránna. Serliga verjan hjá strandingum gav Neistanum stórar trupulleikar, og við henni á odda megnaði StÍF at taka leiðsluna um miðjan fyrra hálvleik. Tá ið Neistin endiliga megnaði at leika seg fram við sterku StÍF-verjuni, so sluppu teir ikki fram við einum vælleikandi Marian í málinum.

Sum fyrri hálvleikur leið, økti StÍF meir um leiðsluna, og trupulleikarnir hjá Neistanum gjørdust størri og størri. Teir sluppu snøgt sagt ikki ígjøgnum StÍF verjuna, og tá liðini fóru til hálvleiks førdi StÍF við 4 málum, og her sást týðiliga, at okkurt mátti henda hjá Neistanum, um teir ætlaðu sær innaftur í dystin.

### StÍF misti takið

StÍF byrjaði seinna hálvleik, júst sum teir endaðu fyrra. Teir løgdu nevnilga fyri sum eitt satt ódnarveður, og fimm minuttir inn í seinna hálvleik høvdu teir økt um leiðslun, soleiðis at munurin nú var heili 7 mál. Neistin tóktist enn hava allar møguligar trupulleikar við verjuni og málverjanum hjá strandingum, men knappliga sóu teir veruleikan í eyguni. Skuldi nakað henda hjá Neistanum, so mátti tað vera nú.

Neistin fór so undir eitt ordans come back. Støðugt minaðu teir um leiðsluna hjá strandingum, og nú vóru rollurnar hjá liðunum vendar fullkomiliga á høvdið. Nú fingu neistamenn knappliga verjuna at rigga, og um miðjan seinna hálvleik vóru bert 3 mál á muni á liðunum.

Neistamenninir vóru tó sera uppsettir hesa løtuna, og tað lá líkasum í luftini, at hesin dysturin ikki var avgjørdur enn, og tað var hann heldur ikki.

Seint í dystinum kom Neistin uppá javnt, og nú var dysturin púra opin. StÍF legði seg tó aftur á odda, og tá ið Neistin fór í tað, sum líktist seinasta álopið í dystinum, vísti talvan 25-24 til StÍF. Neistin spældi bóltin runt eina løtu, áðren teir funnu ein púra leysan Jugoslav á strikuni, men sum so ofta áður stóð Marian fyri honum í málinum við eini stórbjarging, og so vann StÍF dystin við einum máli.

### FAKTA

**Neistin-StÍF 24-25 (10-14)**

**Málskjúttar:**

**Neistin:** Blagoje Buha 8 (3), Tróndur Kragesten 4, Carl Herup Olsen 3, Jugoslav Djumic 3, Roar Dalsgarð 2, Birgir Poulsen 2, Áki Mørk 1, Jákup Apol 1

**StíF:** Finnur Hansson 7 (3), Leivur Justinusen 5, Jacob Jónson 3, Mortan Hansen 3 (1), Borgar Danielsen 2, Andre Danielsen 2, Bárður Danielsen 2, Jørmund Joensen 1

**Brotskøst:** Neistin 3, StÍF 7

**Útvísingar:** Neistin 5, StÍF 4

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andrias F. Hansen

## – Vit gera eitt hav av feilum

Tróndur Kragesten hjá Neistanum var alt annað enn nøgdur eftir tapið fyri StÍF. Hann helst, at feilirnir kostaðu v nógv henda dagin.

- Vit eru alt ov ódisiplineraðir. Vit gera eitt hav av feilum og brenna alt ov nógvar opnar møguleikar ímóti Marian, og hetta eru størstu munirnir í dag. Í seinna hálvleiki fáa vit ein upptúr, har gejsturin er ordiliga góður, og alt byrjar at eydnast. Tá skora vit brádliga hjá Marian, og feilirnir geras færri, men tíverri rakk heta akkurát ikki. Nú mugu vit bara royna at venda keðiligu gongdini. Vit eru góðir nokk, men vit vísa tað bara ikki.

## – Vit sløsa ov illa

Eftir dystin millum Neistin og StÍF fingu vit orðið á Andre Danielsen hjá strandingum. Hann var hampiliga væl nøgdur við fyrra hálvleik, men lat illa at seinna hálvleiki.

– Munurin á liðunum er at kalla eingin í dag. Vit koma væl frá byrjan, men í seinna hálvleiki sløsa vit alt burtur. Vit spæla stutt sagt ótrúliga illa, samstundis sum teirra spæl gerst betri, og hetta gevur okkum trupulleikar. Teir kempa meir enn vit í løtum í seinna hálvleiki, men eg haldi, at eru vit villir nokk, so kunnu vit saktans vinna teir.